# Lívfrøðiliga burðardygg veiða

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna



Herfyri setti Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgtingsmaður, millum annað undirritaðu í Sosialinum spurningin, hvussu skal ásetingin »lívfrøðiliga burðardygg veiða« skiljast. Ivaleyst eru fleiri definitiónir av hesum hugtaki, skal stutt lýsa hugtakið samsvarandi míni fatan av hesi orðing.

Stutt kann sigast, at tá ið støddin á gýtingarstovninum er avgerandi fyri, hvussu nógv verður fiskað, er veiðan burðardygg. ICES hevur ásetingar um, nær stovnurin er soleiðis fyri, at ein kann fiska ávísa nøgd, nær tað er í lagi at fiska, um ávís verjutiltøk mótvegis stovninum verða sett í verk t. d. friðingar av ávísum økjum í ávísa tíð, og nær t. d. toskastovnurin er so illa fyri, at ikki er ráðiligt at troyta hann meir. Um vit fylgja hesum ásetingum, so hava vit eina lívfrøðiliga burðardygga veiðu.

Fyri at útgreina hetta nærri fari eg at endurgeva Skipannarnevndina tann 8. februar 1996: »Stovnsrøktarendamálið er rokkið, um gýtingarstovnurin er oman fyri ávísa minstustødd, og veiðutrýstið síðan er so, at umleið ein triðingur av stovninum verður veiddur á hvørjum ári«, kelda: www.frs.fo

At vit eiga at hava eina burðardygga veiðu er eisini ásett í lógini um vinnuligan fiskiskap: »Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfongi og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga«, kelda: www.logir.fo

At vit eiga at veiða burðardygt fyri at lata nokk av hesum tilfongi víðari til okkara eftirkomarar er sjálvsagt. Í dag er tað eisini alt meira vanligt, at ein ikki fær nøktandi prís fyri veiðuna, um hon ikki er fingin til høldar á ein burðardyggan hátt.

Vónandi er hetta eitt nøktandi svar.

# Bara lúsin útlendsk er

**Stjórin á lemmavirkinum Rock Trawldoors í Vági undrast á, at tað eru stórtíðindi, at útlendingar nú koma við einum modelli av flótitrolslemmum á marknaðin og siga monnum, at hesir saman við botntroli skulu fara betur við botninum**

FISKIVINNA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Hans J. Joensen er stjóri á lemmavirkinum Rock Trawldoors í Oyrunum í Vági, og hann er ørkymlaður í hesum døgum. Ørkymlaður av stórtíðindunum um, at nakrar royndir hjá trolaranum Rankanum av Tvøroyri skulu hava víst, at ein lemmatrolari sum brúkar flótitrolslemmar, saman við tungum ketuvektum, skal verja botnin meir enn vanligir botntrolslemmar.

Sambært tíðindunum í Kringvarpinum ger Rankin kanningarnar í samstarvi við eina smiðju í Thyborøn í Danmark.Men tað ber ti, at fáa lka góðir flótitrolslemmar á Oyrunum í Vági.

- Á okkara verksmiðju hava vit gjørt flótitrolslemmar í áravís, og á okkara heimasíðu, sum eitur www.rock..fo, kunnu fólk lesa, hvussu nógva olju Enniberg spardi við at fara yvir til okkara flótitrolslemmar í 2006, sigur Hans J. Joensen.

### Gloymdu vektirnar

Hann undrast á, at tað eru stórtíðindi, at útlendingar nú koma við einum modelli av flótitrolslemmum á marknaðin og siga monnum, at hesir saman við botntroli skulu fara betri við botnumhvørvinum, og at teir skulu spara so og so nógva olju. -Sum lemmaframleiðarar kanna vit alla tíðina, hvat kann spara olju, og hvat kann gerast fyri verja botnin, men vit eru komnir til tað niðurstøðu, at ein hvørki sparir olju ella verjir botnin við teirri útgerðini, sum hevur verið umrødd í kringvarpinum í dagavís, sigur Hans J. Joensen.

Hann undrast eisini á, at fólk á Havstovuni siga, at allir trolarar áttu at brúkt flótitrolslemmar til botntrol, tí at tað verjir havbotnin. - Menn greiða frá, at botntrollemmarnir, sum teir brúktu frammanundan, vigaðu 2800 kilo hvør, og at teir lemmarnir, sum teir brúka nú, viga 1400 kilo hvør. Men teir gloymdu at siga, at tvær ketuvektir, sum viga 1200-1400 kilo hvør, hanga á breiðlunum og skulu eisini dragast fram eftir botni. Kjølurin á einum botntrollemmi er 14 cm breiður, og sostatt røra hesir eina flatu, sum er 28 cm av botninum undir towing. Harafturímóti røra tvær ketuvektir í minsta lagi eina flatu á 140 cm av botninum tá towað verður, sigur stjórin á lemmavirkinum í Oyrunum.

### Aðrir givnir

Hans J. Joensen sigur, at við at slakka av á motorinum og towa seinni ber eisini til at spara nógva olju, men hvat við fiskiskapinum tá. Ferðin á skipinum er sera týðandi fyri fiskiskapin , og tí heldur hann, at Havstovan eigur at gera nógv fleiri kanningar við at rokna út, hvat verður spart av olju pr. kilo veiddan fisk, áðrenn ein so tíðandi stovnur ferð út at taka dagar í millum hvat lønar seg.

-Vit fylgja við hvat hendur í londunum rundan um okkum og vita, at í Grønlandi hava menn kasta útgerðina upp á land, tí teir fingu nógv minni í, og skuldu teir fáa tað sama í sum aðrir, spardu teir ikki eina krónu í olju. Trý skip hava roynt hetta í Íslandi. Hjá tí eina bátinum, sum roynir á Eystlandinum, hevur tað gingið væl, tað vil siga, at teir hava fingið tað sama sum aðrir. Hinir báðir hava ikki varið nøgdir, og annar hevur koyrt útgerðina í land. Í Noregi hava fleiri roynt hesa útgerð. Vit hava just gjørt eitt botntrolsett til ´´Havbris´´, sum hevur koyrt útgerðina í land. Tann skiparin segði, at skuldu teir fáa tað sama sum hini skipini, máttu teir heingja so nógvar vektir á breidlarnarn, at teir brúktu meiri olju enn við teimum vanligu lemmunum, og tí vildu teir hava nýggjar lemmar frá okkum, sigur Hans J. Joensen.



*Hans J. Joensen*

### Smærri útgerð loysnin

Hann harmast um óvanan hjá føroyingum at leypa á bláman, tá okkurt útlendskt kemur fram, at tað ofta eru summir, sum síggja sær møguleikan í at fáa stuðul til alla ta útgerð, sum skal keypast fyri at kunna fiska við hesari útgerðini. Hann ásannar, at hetta kann møguliga brúkast í fínasta veðri og góðum streymi, men spyr, hvussu verður við oljusparingini, tá veðrið verður ringt í vetur. Ein annar spurningur er, hvussu tað tá fer at gangast at halda lemmunum 10 metrar frá botni, og hvat hendir við tunnu løttu lemmunum, tá teir fleiri ferð hvørt tow bresta í botn.

-Tann einasti veruligi møguleikin fyri at spara olju hjá trolarunum er at brúka minni trol og minni lemmar og so heldur toga eina hálva míl skjótari. Tá ber til at spara olju, so tað forslær og fiska tað sama, sigur stjórin á Rock Trawldoors.

# Tvey oljuleitiloyvi ganga út

LEITILOYVI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Loyvini hjá tveimum av oljufeløgunum, sum hava verið við í forkanningunum og leitingini eftir olju við Føroyar, BP og Anadarko, gingu út mánadagin.

Tað var 17. august í ár 2000, at landsstýrið lat tey fyrstu leitiloyvini á serstakari hátíðarløtu í Norðurlandahúsinum. BP og Anadarko hava latið sínar skrivstovur aftur men umboð fyri feløgini koma tó at brúka nakað av tíð aftrat til at rigga av. Umboðsmaður fyri BP er Hjarnar Djurhuus og fyri Anadarko er tað Johan Mortensen.

Tey bæði oljufeløgini hava verið við í oljuvirkseminum síðani miðskeiðis í 90-unum. BP var leingi eitt av lokomotivunum í leitingini við Føroyar men gjørdi herfyri av at gevast í Føroyum eftir at Williambrunnurin varð turrur.

Nú eru so 9 feløg eftir í leitingini. Tey eru Statoil, ENI, Dong, OMV, Shell, Chevron, Geysir og bæði føroysku feløgini Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum. ENI fer í mars ella apríl næsta ár at bora ein brunn á landgrunninum, og Statoil hevur boðað frá, at tað fer at bora ein brunn helst í 2010.

# Frágreiðing um Neyðhjálp fólkakirkjunnar og handilin »Iktys«

IKTYS
*Tíðindaskriv*

Í skjótt trý ár hevur ”Neyðhjálp fólkakirkjunnar” havt lítlan handil á horninum M. A. Winthersgøta/Tróndargøta, har brúkt klæðir verða seld fyri lítiðog lætt. Peningurin fer til hjálparfelagsskapin ”Neyðhjálp fólkakirkjunnar”, og fólkini í handlinum arbeiða sjálvboðið.

Dentur verður lagdur á góða kundatænastu og hampulig klæði. Á hvørjum plaggi er fest prísmerki, og um tú hyggur væl eftir, sært tú tekst, skrivaðan við heilt smáum stavum. Her stendur, hvat t.d. ein hálvtrýsskrónuseðil kann brúkast til, har illa stendur til úti í verðini. Fyri 50 krónur kann Neyðhjálp fólkakirkjunnar tryggja, at eitt gøtubarn í Kirgistan fær mat, song, heilivág og ráðgeving í 4 dagar.

Handilin arbeiðir væl saman við tí donsku ”Folkekirkens nødhjælp”, men er tó lagaður til føroysk viðurskifti. Tvinni sløg av hjálp eru: Hjálp, tá ið katastrofur ráma og hjálp til fólk, so tey verða før fyri at breyðføða seg og sína familju.

Nógv fólk fregnast eftir og ivast í, um nú alt hetta hjálpir nakað. Vit vita, at tað hjálpir, og hetta gevur okkum treysti til at halda fram.

Niðanfyri finnur tú dømi um, hvussu peningurin kann gagna.

Fyri 40 krónur kann Neyðhjálp fólkakirkjunnar (N.F.) tryggja, at eitt flóttabarn kann verða ansað í 3 dagar, har tað fær kreppuhjálp fyri sálarligu løstir sínar.

Fyri 45 krónur kann N.F. keypa 35 kg. av rísi til tey burmesisku flóttafólkini í Tailandi.

Fyri 60 krónur kann N.F. tryggja einum kastuleysum indiskum barni uppihald á kostskúla í 6 vikur.

Fyri 90 krónur kann N.F. keypa køksgreiðir við t.d. gasskókara, gassi og pannum til eina familju, sum hevur mist alt í eini katastrofu.

Fyri 100 krónur kann N. F. keypa 600 proteinkeksir, sum geva 100 fólkum (í flóttafólkalegu eftir katastrofu) mat í ein dag.

Fyri 125 krónur kann N. F. bjóða eini kvinnu í Guatemala eitt skeið í sniðgeving, framleiðslu og sølu av listahandverki, sum kann tryggja lívsgrundarlagið hjá allari familjuni.